

# Leys størv á Lendisdeildini

## Gravari

Søkt verður eftir gravara til kirkjugarðarnar við Velbastaðvegin, Kirkjubø og Kaldbak. Gravarin er leiðari á kirkjugørðunum. Á gørðunum starvast umframt gravaran 3 fólk fulla tíð.

Gravarastarvið fevnir um alt arbeiðið, sum er á kirkjugørðunum, fyrst og fremst jarðarferðir og samskifti við tey avvarðandi, umframt leiðslu av øllum arbeiðum, viðlíkahaldi og røkt, og hevur ábyrgd av, at tímaseðlar, og jarðarferðarbøkur verða skrivað.

**Førleikakrøv**

Førleikakrøv, royndir í arbeiðsleiðslu, duga væl føroyskt í skrift og talu, kunnleika til teldu, og at hava góðan ans fyri tí serliga starvi, talan er um.

Fyrimunur er at hava áhuga og skil fyri røkt og viðlíkahaldi av grønum økjum, træ- og runnavøkstri v.m.

Skal kunna átaka sær seruppgávur, sum leiðslan áleggur í mun til førleika, undir hesum vera við til at fremja talgildingarskráseting av kirkjugørðunum, og telefonvaktarskipan.

**Arbeiðstíðin**

Arbeiðstíðin er frá kl. 8 - 16, roknast kann við yvirtíðararbeiði.

**Útbúgving og royndir**

Hóskandi úbúgving við atliti at lendisarbeiði, anleggsarbeiði, t.d. handverkarar, arbeiðsplássleiðarar frá jørð og beton, gartnarar við arbeiðsleiðslu og entreprenørar.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er mánaðarlønt fulltíðarstarv í 4. lønarflokki sambært sáttmálanum millum Starvsmanna-felagið og Kommunala Arbeiðsgervarafelag Føroya. Í lønina er roknað samsýning fyri afturvendandi yvirarbeiði og skeiva arbeiðstíð. Byrjast kann í starvinum beinanvegin.

## Gartnari

Søkt verður eftir fólki til gartnaraarbeiði. Umsøkjari skal hava útbúgving innan gartnarí ella skógarbrúk ella kunna vísa á kunnleika innan urtagarðsarbeiði.

Uppgávur eru innan øll grøn øki, ið kommunan varðar av, men arbeiðsøkið kann tillagast áhuganum hjá umsøkjaranum.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og verður skipað í dagligum samstarvi við onnur starvsfólk í gartnara-liðinum. Støðin er á Fruútrøð í Eysturbýnum.

**Førleikakrøv**

Útbúgving ella kunnleiki innan gartnarí ella skógarbrúk. Koyrikort í flokki B er ynskiligt, men ikki eitt krav.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er tímalønt fulltíðarstarv. Lønin er sambært sáttmálanum millum Havnar Handverkarafelag ella Havnar Arbeiðsmannafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Byrjanardagurin verður avtalaður.

## Formaður

Søkt verður eftir formanni til eitt lið av arbeiðsmonnum. Uppgávuslagið er slíkt, sum verður gjørt við hond. Umsøkjarin má hava hug at hava við fólk at gera og at arbeiða úti. Støðin er á Frúutrøð í Eysturbýnum. Koyrikort í flokki B.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er tímalønt fulltíðarstarv. Lønin er sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Formans-viðbót verður latin.

## Starvsfólk til kirkjugarðin

Søkt verður eftir einum fólki til alt fyrifallandi arbeiði í kirkjugarðinum við Velbastavegin. Partur av arbeiðinum er grevstur við maskinu. Upplæring kann gevast.

Aðrar uppgávur eru, millum annað, røkt av gøtum og upprætting av gravsteinum. Grassláttурin hevur vanliga verið boðin út til privatan veitara.

Arbeitt verður í dagligum samstarvi við hini starvsfólkini í kirkjugarðinum. Roknast má við úrtíðararbeiði um vikuskiftið.

**Førleikakrøv**

Koyrikort í flokki B ella traktor/motoramboð. Útbúgving innan smíð ella jarðarbrúk er viðkomandi, men ikki eitt krav.

## Hegning og stoyping

Søkt verður eftir fólki til at seta úthegn, ymiskt timburarbeiði og smærri stoypiuppgávur. Arbeitt verður í einum liði uppá tvey fólk, har tú verður annar. Støðin er á Hjalla.

**Førleikakrøv**

Útbúgving innan smíð er ynskilig. Koyrikort í flokki B er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er tímalønt fulltíðarstarv. Lønin er sambært sáttmálanum millum Havnar Arbeiðsmannafelag ella Havnar Handverkarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

## Meira fæst at vita

um størvini við at venda sær til Jógvan Olsen, gartnara, á telefon 30 20 10 ella 27 36 80.

## Umsókn

saman við viðmælum, avriti av prógvum o.t. og upplýsing um royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. februar 2008.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo**

Tórshavnar kommuna